# Lærurikur valfundur

**Í staðin fyri háfloygdar røður og tóm vallyfti fingu kvinnurnar á valfundinum í Klaksvík týskvøldið eitt lærurikt innlit í arbeiðsdagin hjá einum býráðspolitikara**

VALFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Valevnini, sum luttóku á valfundinum í Klaksvík týskvøldið, vóru Gunnvá við Keldu, Bjørg Sørensen og Elsebeth Hansen fyri Fólkaflokkin, Eyðgunn Samuelsen og Signhild Joensen fyri Javnaðarflokkin, Katrin Biskupstø og Jórun Høgnesen fyri Tjóðveldisflokkin, Maria Olsen fyri Sambandsflokkin og Maiken Skarðenni fyri Sjálvstýrisflokkin*

**Klaksvík:**
Eins og undanfarin val, skipaði Klaksvíkar Húsmøðrafelag týskvøldið fyri politiskum valfundi, har bert kvinnuligu valevnini til kommunuvalið myndaðu pallborðið. Og hóast kvinnurnar ikki vóru møttar so fjølment, sum tær plaga, høvdu tær, sum møttu, nógvar og rættiliga ítøkiligar spurningar uppá hjarta.

### Hørð og bleyt virði

Eyðgunn Samuelsen legið út við at staðfesta, at komandi býráðval mundi vera eitt tað týdningarmesta í Norðoyggjum nakrantíð og sipaði sjálvsagt til fasta sambandið um Leiríksfjørð og tær broytingar, hetta fer at hava við sær. Tær flestu av hinum valevnunum gjørdu sær eisini tankar um hesar broytingar í sínum framløgum, og tað var ikki sørt forkunnugt at hoyra fiskiflotan, vinnulív og framtíðar útflutningmøguleikar ganga sum ein reyðan tráð gjøgnum flestu av framløgunum á einum kvinnuvalfundi. Sjónarmiðini vóru eisini øðrvísi enn tey vanligu og mintu áhoyrarnar á, at uttan mun til, hvussu vit snara teimum "hørðu" málunum, so hava tey altíð í síðsta enda avleiðingar fyri tey bleytu virðini og trivnaðin hjá tí einstaka borgarnum.

### Frá gransking til barnaansing

Gunnvá við Keldu tóktist vera tann av teimum 9 valevnunum sum tóku lut á fundinum, sum hevði gjørt sær flest tankar um, hvusssu Klasvíkin kemur at síggja út um eini 5-10 ár. Hon legði størsta dentin á týdningin av gansking, vitan og KT sum drívmegin í einum vælvirkandi vinnulívi, sum aftur er treytin fyri, at vit kunnu skapa eitt nóg fjøltáttaðað samfelag, til at øll kunnu trívast í tí.

Í sínum framløgum varpaðu Maria Olsen og Maiken Skarðenni serliga ljós á umhvørvisspurningar við at vísa á, hvussu umráðandi tað er, at vit leggja okkum eftir at ávirka børnini soleiðis, at fyrivarni fyri umhvørvinum verður ein náturligur partur av okkara livihátti og gerandisdegi framyvir. Katrin Biskupstø valdi at seta kikarin á tær ofta út av lagi vánaligu umstøðurnar hjá teimum sálarliga veiku í Norðoyggjum og hevði sett sær fyri at arbeiða á ein hátt, so at økispsykiatriin aftur kemur at virka. Av tí, sum annars kom fram, kann nevnast stóri spurningurin um karmarnar hjá fólkaskúlanum í Klaksvík, týdningin av at varveita ungdómin í býnum eftir at tunnilin er vorðin veruleiki og at tryggja, at arbeiðið við at skaffa ansingartrygd til børnini heldur áfram.

### Veruleikin

Kjakið aftaná framløgurnar var í stóran mun merkt av spurninginum um handilsmiðdepilin í miðbýnum. Á fundinum kom fram, at í løtuni standa ongir íleggjarar klárir at byrja hetta arbeiðið, av tí at tað er so truplult at fáa neyðuga figging til ætlanina. Nær nakað víðari fer at henda í hesum málinum, er sostatt framvegis rættiliga ógreitt, tí hóast Klaksvíkar Kommuna stuðlar ætlanini, verður tað ikki kommunan, sum fer at gera hana til veruleika.

Hóast valfundurin týskvøldi kundi tykjast í so varisligur í løtum, var hann samanumtikið rættiliga áhugaverdur - ikki minst á tann hátt, sitandi býráðslimirnir Eyðgunn Samuelsen og Jórun Høgnesen megnaðu at relatera kjakið til treytirnar, ein politikari til ein og hvørja tíð arbeiðir undir. So í staðin fyri háfloygdar røður og tóm vallyftir fóru flestu av áhoyrarnum hetta kvøldið uttan iva heim við einum betri innliti í, hvat tað vil siga, at arbeiða sum býráðspolitikari - eisini tá valið er av og truplar avgerðir og raðfestingar mynda arbeiðsgongdina.

# Deydligt á Tvøroyri

**Á veljarafundi á Tvøroyri hóskvøldið, kom ikki lív í áskoðararnar, fyrrenn prátið kom inn á at vetrarfriða býin fyri seyð**

VELJARAFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað var ikki so nógv fólk á veljarafundi á Tvøroyri hóskvøldið, sum tey høvdu væntað. Onkur tók til, at so nógvir áhoyrarar áttu at verið á hvørjum einasta býráðsfundi*

– Tyrvingarpláss til mold og Suðuroyggin sum ein kraftmiðdepil.

Tað skerst ikki burtur, at tey, sum bjóðað seg fram á býráðsvalinum á Tvøroyri týsdagin, sveimaðu víða á veljarafundi í skúlahøllini í Trongisvági hóskvøldið.

Har varð, sum vera mann, nomið við mangt og hvat, frá tí heilt smáa til tað tað heilt stóra.

Men líka lítið hjálpti, tí tað gekk illa at fáa lív í teir áskoðarar, sum høvdu leitað sær á veljarafund hetta kvøldið.

Tað var ikki, fyrrenn onkur spurdi býráðslimir, hvussu gekst við ætlanini at friða Tvøroyri fyri seyð um veturin, at eitt sindur av lívi kom í.

Tvøroyrar Kommuna hevur í fleiri ár havt á skránni at vetrarfriða býin, ein og peningur er settur av til endamálið í fleiri ár. Higartil hevur tað ongantíð eydnast at brúka hendan peningin, tí enn er Tvøroyri ikki vetrarfriðað.

Men tað var skilligt, at hetta er nakað, sum nógvir veljarar hugsa um og í prátinum um vetrarfriðing var einastu ferð á fundinum, at valevnini stóðu fyri eitt sindur lunkaðum skotum.

Men tey fingu so greitt at vita, nakað er gjørt við málið og kemur ikki stígur í, verður ongin seyður at síggja á tvøragøtum næsta vetur.....

### Onki val so týdningarmikið sum hetta

Eitt, sum fleiri valevni royndu at sannføra veljaranum, var, at hetta er tað týdningarmesta býráðsvalið á Tvøroyr í eitt mannaminni.

Víst var á, at við árslok 2005, er skuldin hjá kommununi komin niður á 64 milliónir, sum er 1,5 álíkning. Tá ið ringast stóð til fyri eini 10-12 árum síðani, var skuldin 180 milliónir, sum var sjey álíkningar.

Men støðan nú merkir, at býráðið í komandi tíðum fer at fáa nógv meiri pening um hendi at arbeiða við.

Tí hevði tað alstóran týdning at velja býráðslimir, sum vóru førir fyri at umsita hetta økta, fíggjarliga frælsi, vóru tað nógv valevni, sum vístu.

Men uppskotini um, hvat hesin peningurin skuldi brúkast til, trutu ikki: Onkur vildi hava nýggjan bátahyl, ein annar nýggjan keikant, ein umrøddi nýggja svimjihøll, ein triði nýggan fótbóltsvøll. Sambýli til eldri vildi onkur hava og onkur annar, ungdómshús. Og so skuldi vegir breiðkast og asfalterast og alt vatnið skuldi reinsast. Og so var tað eisini okkurt valevni, sum vísti á týdningin av at kommunan altíð hevði grundstykki til fólk at byggja á.

Annars vóru tað fleiri valevni, sum søgdu, at tað einasta rætta er at leggja alla Suðuroynna í eina kommunu.

Hinvegin varð ætlanin hjá landsstýrinum um at flyta heilsuskúlan á Tvøroyri í ein skúladepil í Hovi, ikki so nógv umrødd, sum væntandi var.

Men tey, sum høvdu orðið, vóru ymisk á máli: Onkur tók undir við ætlanini, men onnur vildi ikki hoyra talan um at flyta hann.



# "Terror" í dós



*– Eg havi ikki orð fyri, hvussu ótrúligt, tað er, at fólk kunnu keypa sær eitt telefonhald uttan at skráseta seg, sigur Bárður Persson, sum hevur fingið fleiri ótespilig smsboð sendandi uttan at tað ber til at staðfesta, hvør avsendarin er, tí ongin skráseting fyriliggur*

*Mynd: Jens K. Vang*

**– Tá ókendu sms-boðini byrjaðu at blíva beinleiðis ólekkur, fekk eg nokk og boðaði løgregluni frá, sigur Bárður Persson, sjónleikari, sum er í øðini um, at tað ber til at ogna sær eitt fartelefonnummar uttan at skráseta seg**

TELEFONTERROR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sunnunáttina um eitt tíðina fekk Bárður Persson eini sms boð á sína telefon. Har stóð bara ein spurningur, um nær Gríma aftur fór at spæla leikin Elling og Kjell Bjarni. Bárður kendi ikki nummarið, men hann svaraði kortini smsboðunum og spurdi eisini, hvør viðkomandi var.

Hann fekk svar, men viðkomandi vildi ikki avdúka seg sjálvan.

Síðani byrjaði sms-boðini at koma títtari, og tey vóru bæði grov og ólekkur. Bárður sigur, at í fyrstuni slettaði hann tey bara, men annan dagin eftir byrjaði hann at hugsa, at tað kundi ikki vera rætt, at hann skuldi verða órógvaður í heilum á hendan hátt.

Tann eina morgunin hann vaknaði vóru fýra sms-boð á telefonini frá hesum sama nummarinum.

Í tí eina sms-inum stóð: "Góðan morgun, Bárður, vaknaður? Nær fórt tú til hús í nátt? Tað mundi vera seint."

Tað varð sent honum klokkan 08.31.50 mánamorgunin.

Hetta fekk ein óhugnaligan tanka um, at onkur eygleiddi seg, at spíra í høvdinum hjá Bárði.

Hini sms-boðini vóru øll grov og vulger, og tá fekk hann nokk.

### Meldaði

Bárður vendi sær til løgregluna, sum síðani fór at kanna málið. Telefonnummarið var eitt frá Kalli. Eitt av teimum, sum ein kann keypa við Frælsi í Dós. Tá so løgreglan royndi at fáa uppsporað, hvør mundi eiga telefonnummarið, bar tað ikki til, tí nummarið ikki var skrásett í skipanini hjá Kalli. Tað vil siga, at brúkarin hevði valt ikki at skráseta seg.

Løgreglan ringdi til hetta nummarið. Bárður sigur, at honum varð sagt, at ein kvinna tók telefonina og segði bara, at løgreglan ikki skuldi ringja til hana aftur. Síðani bleiv avbrotið og telefonin sløkt.

– Eg skal tó skunda mær at siga, at síðani tá hevur verið so toluligur friður, men tað er óluksáliga nógv fyri, at fólk kunnu ogna sær eina telefon í dag uttan at verða skrásett fyri tað. Eg meini so við, í nýmótans samfelagnum í dag, er tað ógvuliga lítið, sum tú kanst gera, uttan at tú skal skriva undir uppá tað, vísir Bárður Persson á og leggur afturat, at her er ikki talan um Frælsi í dós, men "terror" í dós.

Bárður hevur ikki orð fyri, hvussu ótespiligt hann heldur tað vera, at hann fór til løgregluna og gjørdi vart við, at tað møguliga er onkur sjúkur persónur, sum heldur eyguni við honum, og løgreglan ikki kundi gera nakað, tí telefonnummarið ikki var skrásett.

### Vil steðga hesum

Bárður Persson hevur ikki ánilsi fyri, hvør tað kann vera, sum hevur sent honum hesi sms-boðini. Hann viðgongur, at hann bleiv sera skakkur av summum av sms-boðunum, men so fleyt bikarið yvir, og hann fór til løgregluna, sum tó ikki fekk gjørt so nógv við tað.

Hann hevur valt at standa fram við hesum, tí hann ber ótta fyri, at tað kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri fólk, um slíkur telefonterror sleppur ótarnaður at halda fram.

– Hvørjum líkist tað, at ein persónur kann keypa eitt tól, sum er roknað til samskifti, og nýta tað sum eitt terrorvápn, spyr Bárður, sum ikki ivast í, at tað munnu vera fleiri enn bara hann, sum hava verið úti fyri onkrum líknandi.

– Fólk munnu bara ikki altíð hugsa um, hvørji rættindi tey hava. Eg finni meg so í øllum førum ikki í hesum, slær hann fast.

Hann heldur fram, at í fyrstuni flenti hann bara, men so fór hann at hugsa um, hvussu langt hetta kundi fara.

– Eg stúri fyri, hvussu hetta kann fara at útvikla seg. Eg vil ikki heingja nakran út. Eg vil bara hava, at hetta skal halda uppat, áðrenn fólk fara at nýta fartelefonir sum eitt terrorvápn, sigur Bárður og sipar eitt nú til happing gjøgnum sms-boð í fólkaskúlanum ella millum ungdóm yvirhøvur.





## Skráseting – eitt val

Brúkarar hjá Kalli, sum brúka Frælsi í dós, gera sjálvi av, um tey skráseta seg ella ikki. Í dósini liggur eitt skrásetingarskjal, sum tey kunnu senda inn, um tey ynskja tað. Frá Kalli verður sagt, at tey vilja fegin hava allar brúkararnar at skráseta seg, so tí bjóða tey 25 krónur ókeypis talutíð við Frælsi í dós fyri at fáa brúkaran at skráseta seg.

– Men um ein brúkari av Frælsi í dós ikki velur at skráseta seg, so vita vit ikki, hvør eigur telefonnummarið. Men hartil skal sigast, at um talan er um grov mál av telefonterror, so ber til at finna fram ein telefonlista hjá hesum telefonnummarinum, og harvið møguliga fáa uppsporað hvør brúkarin er, siga tey frá Kalli.

**- sae -**

## Krevja skráseting

Á Føroya Tele verða brúkararnir skrásettir, tá tey keypa sær eitt telefonhald. Tað veri seg bæði fastnet, GSM ella talutíð.

– Tað kann sjálvandi gleppa onkuntíð, men tá ringja vit so til tey og biðja tey koma inn at skráseta seg. Men meginreglan hjá okkum er, at øll skulu skráseta seg sum brúkarar hjá okkum. Hinvegin hava vit onga ávirkan á, hvat hendir, um nú ein brúkari hjá okkum, ger av at selja sítt hald víðari til ein annan persón, sum ikki vil skráseta seg, verður sagt frá Føroya Tele.

**- sae -**

## Skráseting burdi verið krav

– Løgreglan fær onkur mál av og á um fólk, sum verða órógvað av ókendum sms-boðum, men tað er ikki so ofta, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á Kriminaldeildini hjá løgregluni og leggur afturat, at fólk duga eisini væl at skyna á, nær grundarlag er fyri at boða løgregluni frá ella ikki.

Hann heldur fram, at tá eitt mál verður kannað, roynir løgreglan altíð at finna fram til viðkomandi persón, sum eigur telefonina og fáa hann at halda uppat. Men samstundis viðgongur Bergleif, at tað kemur fyri viðhvørt, at tað ikki ber til at finna persónin, tí viðkomandi ikki hevur skrásett seg sum brúkara.

Í teimum førum, har løgreglan hevur funnið viðkomandi, hevur tað í flestu førum víst seg at hjálpt.

Men Bergleif Brimvík heldur kortini, at tað átti at verið eitt krav, at ein sum útvegar sær eitt telefonnummar varð skrásettur hjá telefelagnum.

– Um talan nú er um eitt serliga grovt mál, so hevur løgreglan jú brúk fyri at kunna uppspora persónin skjótt. Men um hann ikki er skrásettur, so sigur tað seg sjálvt, tað kann darva uppkláringararbeiðinum, sigur Bergleif Brimvík.

**- sae -**